# Ikki apan, men leyvan

TINGHELLUDEBATTI
*Erhard Jacobsen*



Hesar seinastu dagarnar hevur ein rúgvismikil umrøða av darwinismuni verið at sæð í bløðunum. Tíverri er henda umrøða á so høgum vísindaligum støði, at vit vanlig menniskju hava ongan sum helst kjans at fylgja við, tíansheldur at taka støðu í tjakinum. Lættari verður tað ikki av, at boðskapurin í hesi umrøðu er so innballaður, at tú veitst ikki rættiliga, hvat endamálið er við allari hesari skrivingini. Er endamálið, at vit bara skulu taka hesar upplýsingar, sum verða lagdir fram, til eftirtektar? Góðtaka teir, meta fyri og ímóti ella beinleiðis mótmæla? Ella er ætlanin, at vit ella onkur annar skulu taka til atgerðir av onkrum slag? Ein triði møguleiki er, at vit als ikki vilja luttaka í einum tjaki, sum fer fram á hendan serliga hátt, og sum í veruleikanum hevur eina fjalda dagsskrá. Enn hava vit tíbetur ikki í Føroyum eitt ovasta trúarráð, sum tekur støðu til, um til dømis menningarlæran er eitt viðkomandi evni ella nøkur hóttan, tá ið vit tosa um trúgv og frelsu. Okkara samfelag er skipað í sektorar, sum hava tilhoyrandi stovnar, sum taka sær av teimum málum, sum hoyra til júst tann ávísa sektorin.

Tað, sum eg haldi meg skilja av allari skrivingini, er, at lærarar í lívfrøði tvíhalda um darwinismuna, tvs. forklára menningina av lívinum við læruni um hitt 'natúrliga úrvalið'. Hetta meta summi er skeivt og vísa til skapanarlæruna, og tað hava tey fullan rætt til. Men her eru kortini nøkur ivamál.

Fyri tað fyrsta fari eg at loyva mær at ivast í, at lærarar í lívfrøði eru moldvørpur, sum við vilja (ella av óvart) royna at máa støðið undan kristindóminum. At sagt tað, vildi verið tvætl. Í øðrum lagi fari eg eisini at ivast í, at menningarlæran er tað einasta, sum lívfrøði snýr seg um. Um so er, so livir frálæran ikki upp til vanlig krøv fyri slíka frálæru.

## Darwinisman ein hypotesa

Tað er ein royndur lutur, at darwinistiska hypotesan um menningina av teimum ymsu djóra- og plantusløgunum samsvarar heilt væl við empiriskar kanningar, bæði observatión og eksperiment (aling). Men haldi tykkum fast: her er talan um eina forkláring, ein hátt at fáa greiðu á nøkrum viðurskiftum, eina roynd at gera tað fløkta einfalt og framleiða eitt ástøði, sum møguliga kann vísa seg nýtiligt hjá okkum neyðars menniskjum. Eitt andans bragd, men ikki allur sannleikin!

Hóast darwinisman hevur havt ávirkan langt út um lívfrøðina, so er hon hóast alt mannaverk, og talan er í hvussu er ikki um nakra nýggja religión. At hetta darwinistiska og eisini onnur í dag fullkomiliga viðurkend vísindalig ástøði hava verið noydd at berjast við áskoðanir, sum hava brúkt religión sum prógvførslu, er ein onnur søga. Men partarnir hava sum oftast verið førir fyri at gloyma gamalt agg og finna aftur á røttu leiðina.

Fyrsta treytin fyri at eitt ástøði kann halda er, at tað ikki bara byggir á tað, sum onkur autoritetur sigur, men at tað er opið fyri eftirkannan fyrst og fremst í opnum tjaki, og ikki minni at tað skal vera ment at standa seg, tá ið tað verður testað við empiriskum royndum. Og her noyðast vit menniskju at taka lut. Vit mugu hugsa og meta um úrslitini, tí tey koma ikki av sær sjálvum. Hitt, at ein Stalin ella Hitler veit, hvat er rætt (eisini tá ið talan er um lívfrøði), tað kenna vit tíverri alt ov gott fylgjurnar av. Og søgan er full av dømum um, at yvirvøldin, eisini tann religiøsa yvirvøldin, hevur kúgað fólk við sannføringum, sum í dag eru almennir og avgerandi sannleikar. Mær nýtist ikki at nevna nøvn.

## Gud sum skapari

Tað kann væl vera, at Gud, hvussu vit so enn uppfata hann ella hana, skapti lívið og alt sum til er, og eg havi álvaratos ilt við at ímynda mær aðra forkláring. Og henda uppfatan hjá mær er ikki ávirkað av, men kanska heldur styrkt av, at eg havi lisið partar av tí, sum Darwin hevur skrivað. Men um skapanartilgongdin fór fram 'akkurát' sum tilskilað í Bíbliuni, tað kunnu vit loyva okkum at ivast í, uttan at vit av teirri grund skulu gera av við Gud. Kann vera, at Gud hevur eina aðra tíðarfatan enn vit menniskju. Hinvegin kann ein undrast á, at tann bíbilska skapanarfrásøgnin líkist so nógv eini menningartilgongd: at Gud skapti himmalin, jørðina og alt livandi, ikki soleiðis alt í einum, men so líðandi í sjey dagar.

Mær kunnugt hevur hvørki Darwin ella fyri tað nakar annar megnað at forklára, hvussu lívið og alt hitt er íkomið, og tað vildi eisini verið nóg so nógv at kravt. Stjørnufrøðingar royna enn við sera fløktum útrokningum at avdúka hvat hendi tey fyrstu sekundini aftan á stóra brestin, og hugskotini eru nógv. Frá gamlari tíð hava vit ein hóp av frásagnum um skapanartilgongdina, men talan er tá altíð um metaforiskar ella mytologiskar forkláringar.

Vísindin yvirlivir ikki uttan metafysiskar spekulatiónir, og har kann mangan leika hart á. Nútímans vísindi byggir á, at vitan er menniskjalig, ein háttur hjá menniskjanum at fáa hald á umheiminum og skapa sær ein heim at liva í. Vitan kann vera meir ella minni eksakt og empiriskt funderað. Religión er ein formur fyri vitan, sum víkir avgerandi frá vísindi í og við, at henda vitan byggir á trúgv ella dogmur. Religiøsur rationalitetur er av heilt øðrum slag enn vísindaligi rationaliteturin. Religión og vísindi kunnu hava ein felags metafysiskan basis, men eru kortini fullkomiliga ólíkir vitanarformar.

Onkur hevur tó sagt tað so vísiliga, at hvørki tilveran ella fatanin (t.d. vísindi og religión) eru bara ein spurningur um vitan, tíansheldur bara ein spurningur um trúgv.

## Fleiri vitanarformar

Í vanliga gerandislívi okkara eru vísindi og religión bara tveir av fleiri vitanarformum. Aðrir vitanarformar eru eitt nú ymsir praktiskir førleikar, list og mentan, sum saman við øllum hinum eru við til at skapa okkum sum menniskju og mynda hina menniskjaligu tilveruna. Vitanarformarnir kappast innanhýsis og sínámillum um at gera vart við seg. Luther t.d. gjørdi greiðan skilna millum trúgv og vitan og viðurkendi harvið, at nútímans náttúruvísindi hevði sínar egnu reglur at ganga eftir. Men í somu løtu vit siga, at ein vitanarformur er 'betri', ella at ein vitanarformur er yvir øllum hinum, tá er vandi á ferð.

Vit kunnu skjótt semjast um, at vísindalig vitan hevur verið høgt í metum, men eg hugsi, at vit øll mugu ásanna, at visindalig vitan hevur ikki tann status, hon hevur havt, og at aðrir meiri 'andaligir' og 'sosialir' vitanarformar hava vunnið fram. Og samstundis munnu vit øll hava varnast, at vitanarlandslagið eisini er vorðið meira skurvut hesi seinastu árini. Objektiv vitan er í størri mun avloyst av subjektivari vitan, sum er grundað á upplivingar, meiningar og áhugamál hjá einstaklingum og bólkum.

Tí virkar hendan skrivingin um darwinismuna eitt sindur undarlig.

Tú fært hug at spyrja, hví so nógv hóvasták verður gjørt burtur úr Darwin beint nú?

Ja, ein fær hug at spyrja, um tað er hent okkurt nýliga, sum ger, at Darwin knappliga má diskuterast á ein hátt, so ein skuldi trúð, at annar hvør føroyingur 'trýr' á Darwin. Nú er Darwin farin av foldum, og mær kunnugt hevur hann ikki lovað at venda aftur at frelsa okkum og føra okkum heim í hin æviga bústaðin. Og eg síggi ongi samkomuhús bygd til dyrkan av Darwin, men milliónir av krónum, sum verða brúktar til samkomuhús, bygd til Gudsdyrkan. So í so máta man ikki standa so illa til. Og so er eisini vert at nevna, at ovasti leiðarin fyri teirri føroysku fólkakirkjuni er eitt umboð fyri eina ikkikirkjuliga samkomu. So tolsemið trívist eisini í Føroyum.

Ein grund til hesa nógvu skrivingina kann vera, at hugtakið 'synd' tykist vera horvið mangastaðnis, ella í hvussu er at hava broytt innihald, og tað elvir viðhvørt til ógvislig mótrák. Her í Føroyum eru vit tó enn so religiøs, at tú onkuntíð hevur hug at halda, at tað er næstan ov nógv av tí góða. Er tað nú eisini meiningin, at skúlarnir skulu vera samkomuhús? Ein annar spurningur er, um skúlabøkurnar, so sum hendir summastaðnis í USA, nú skulu umskrivast, so tær samsvara við Bíbliuna til dømis í júst hesum einstaka máli? Ella samsvara við hugleiðingarnar hjá onkrum meiri ella minni kendum amerikanskum professara, sum byggir sínar pástandir á Bíbliuna, og leitar sær stuðul í ástøðinum um sannlíkindi og brotum úr informatiónsvísindini. Hvussu so við stjørnufrøðini og læknafrøðini, skulu eisini gerast ávísar broytingar har? Av royndum vita vit, at slíkur framferðarháttur tænir hvørki vísindini, frálæruni ella religiónini, og meg lysti at vita, um slíkur framferðarháttur kann leita sær stuðul ella legitimitet úr Bíbliuni.

## Teleologisk ella teologisk Gudsprógv

At leggja fram Gudsprógv var einaferð eitt nógv brúkt ítriv, og okkurt av hesum Gudsprógvum eru enntá hugvekjandi, ikki minst prógvið hjá Anselm um Gud sum tað mest fullkomnu veruna, sum tískil eisini má vera til, tí annars var hon ikki fullkomin. Eg má siga, at eg kenni meg ikki heilt tryggan við teologisku argumentini, sum kunnu lesast úr omanfyri nevndu rúgvismiklu umrøðu av darwinismuni. Hví er tann teologiska Gudsfatanin ikki góð nokk longur? Teologisku argumentini byggja ofta á eina einfalda, dogmatiska metafysik, sum skjótt kann enda sum fundamentalisma.

Guð náði okkum, tá ið alt tjakið tagnar, og vit bert skulu remsa upp lærusetningar hjá onkrum sjálvútnevndum profeti, sum sigur seg kenna 'designaran'. Eg síggi eisini, at onkur í omanfyri nevndu greinum samanber Gud við ein urmakara. Ein slík handverkara-analogi er neyvan haldbar í okkara modernaða samfelag. Hvussu við interneti, hvør er 'urmakarin' har?

At enda kann eg líka nevna, at soleiðis, sum eg lesi tær umrøður, sum nýliga hava staðið í bløðunum, so billar man fólki inn, at Darwin skal hava forklárað allar lívsins smálutir við einum nokk so fiksum modelli, fyri síðan at afturvísa hesum tápuliga pástandi. Eg havi eisini ilt við at ímynda mær, kanska tí at eg fylgdi so illa við í skúlanum, at lívfrøðin stendur og fellur við Darwin, um tað yvirhøvur ber til at orða seg soleiðis. Eg rokni við, at lívfrøðin er munandi meira kompliserað, um hon verður handfarin av kompetentum fólki, og endaliga svarið um hesi viðurskifti er ikki funnið, og - mugu vit rokna við - verður heldur ikki funnið av okkum menniskjum, soleiðis sum eitt nú Paulus eisini so vísiliga hevur nevnt tað í hvussu so er í einum av sínum brøvum. Í okkara dagliga virki verða vit noydd at taka til takka við tí, sum tykist okkum menniskjum skilabest, og í kompliseraðum spurningum verða vit noydd í ein vissan mun at geva kompetentum fólki fríar hendur at leggja vísindalig úrslit og pástandir fram. Viðhvørt er tað skilagott at trúgva tí, sum tey siga, men at gloypa øllum rátt er nú heldur ikki neyðugt.

At gera vísindi til religión ella øvugt fer neyvan at føra til annað enn fjant og fjas og kanska tað, ið verri er. Eisini um guruin eitur Darwin. Í lívsins avgerandi spurningum eru og fara altíð at vera viðurskifti, sum ikki kunnu avgerast vísindaliga, men sum hvørt einstakt menniskja sjálvt má taka støðu til. Og har er religiónin avgjørt viðkomandi. Í tí sambandi haldi eg tað vera umráðandi at gera vart við, at onki hald er í nógvu pástandunum um, at kristindómur er antihumanistiskur. Lesið bara hjá Markus, kap. 2, serliga ørindini 27 og 28.

Ikki fyri at vera óndsinnaður, men um menniskjuni stava frá apunum, ja, tað kann vera stuttligt at spæla sær við, um man ikki hevur annað at taka sær til. Eg fari tó at loyva mær at enda við at sitera norska skaldið Olaf Bull, tá ið hann í yrkingini Poetisk Zoologi sigur:

*Mysteriet med apen*
*som slægtens kommentar,*
*faar gjælde videnskapen -*
*nei, løven er min far!*